## DAGSINS MEINING

# Ein sjálvsøgd staðfesting!

Loksins varð lok lagt á málið um undirgrundina, eftir at danska Ekstrablaðið royndi at finna eina góða søgu um, at Poul Schlüther skuldi hava latið av hondum virði fyri 360 milliardir krónur – sum statskassin átti.

Fyri føroyingar er tað einki nýtt, hvussu mannagongdin var viðvíkjandi undirgrundarsamráðingunum, men fyri danir kann hetta kanska tykjast ørkymlandi. Men havast skal í huga, at hetta fór fram, áðrenn Føroyar komu í yvirskriftirnar í donsku miðlunum eftir búskaparskrædlið í 1992/93.

Tað hevur ongantíð valdað ivi um, at undirgrundaravtalan er endalig, og at hetta ikki kann broytast. Út frá hesum hava bæði føroyskir og danskir myndugleikar handlað, eins og altjóða oljufeløgini.

Allir føroyskir politiskir flokkar hava eisini handlað út frá hesum, sjálvt Tjóðveldisflokkurin, sum nú í fullveldisherferðini royndi at rumbla eitt sindur um, at danir kundu taka aftur undirgrundina.

Danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, og andstøðuleiðarin, Anders Fogh Rasmussen, siga við ein munn, at undirgrundaravtalan verður ikki rørd. Føroyingar eiga alla oljuna í undirgrundini, eins og inntøkurnar av henni. At rørt undirgrundaravtaluna av nýggjum hevði verið at borið seg at sum ein gomul kolonimakt, staðfestir møguliga komandi forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen.

Eingin ivi er um, at høvdu danir nortið hesa avtalu, hevði avleiðingin verið, at danir fingu heimssamfelagið upp á nakkan, og at sjálvt Sambandsflokkurin hevði umhugsað støðuna í ríkisfelagsskapinum.

Eftir eru so bara ekstremistarnir í Danska Fólkaflokkinum og ávísir føroyingar – ið vilja gera alt fyri at skaða ríkisfelagsskapin – sum vilja halda uppi hesum endamálsleysa orðaskifti…

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Anna Askham 100 ár



Mánadagin fyllir kenda havnakonan Anna Cathrina Askham 100 ár. Hon er komin upp í fræga liðið, sum hevur livað eina heila øld við fullum skili. Tá undirritaði fór at ganga í skúla á Strondum seinast í sekstiárunum kom eg av og á inn í húsini hjá dóttir Onnu Cathriunu, Marthu, sum er gift við Hans David, vanliga nevndur Daji á Strondum. Vinskapur er millum húsini. Anna Cathrina plagdi at at vera inni og vitja dóttrina og eg minnist hana sum eina vinarliga eldri konu. Herfyri møtti eg Marthu í SMS. Vit høvdu ikki sæst í mong ár og meðan vit práta, spyrji eg, hvat hon gjørdi í Havn í dag. “Eg havi verið og vitja mammu, svaraði hon. Og so glapp næstan út av munninum á mær, eg veit ikki um tað fór heilt út. “Mammu tín, er hon enn á lívi? Hon var 70 seinast eg sá hana og tað kennist sum ein øld síðan.”

Anna eigur seks børn á lívi og tvey doyðu sum smá. Hon eigur 26 ommubørn og tey hava verið ógvuliga góð við hana. Eg gekk í skúla Danmark saman við einum miðskeiðis í sjeytiárunum. Sjálvt um hann var farin um tey 20, so fekk hann jólaljós í eyguni, tá hann tosaði um køkuhúsið hjá ommuni heima, sum hon gjørdu til jólini.

Anna letir ikki 100 ára dagin soleiðs bara fara fram við borðinum. Nei dagurin verður hildin við manér. Mánadagin verður opið hús í HB húsinum, har ætt, vinir og kenningar eru vælkomnir at hitta hana frá klokkan fimm seinnapart og til klokkan tíggju á kvøldi.

je

### Nýggjur stjóri á LMS

### Petur Ove Petersen stjóri á Landsmiðstøðini fyri undirvísingarambóð



Petur Ove Petersen var hósdagin settur sum stjóri fyri Landsmiðstøðina fyri Undirvísingarambóð.

Starvið varð leyst, tá Petur Simonsen herfyri fór í annað leiðarastarv, sum hevur við starvsfólkaviðurskifti at gera í Tinganes. Samstundis hevur hann biðið um farloyv í tvey ár frá Landsmiðstøðini, og tí er Petur Ove Petersen settur í eitt tíðaravmarkað starv í tvey ár.

Petur Ove Petersen er útbúgvin lærari frá Føroya Læraraskúla í 1983. Hann hevur verið lærari í Hósvík 1983-84, á Føroya Fólkaháskúla 1984-85 og í Kollafirði síðani 1985. Eftir hetta flutti hann til Havnar, har hann hevur undirvíst sum lærari, og seinasta hálva árið hevur hann arbeitt á Føroy Skúlabókagrunni.

Petur Ove Petersen er væl kendur á Landsmiðstøðini, tí hann hevur í nógv ár verið lærureinaráðgevi har.

Petur Ove hevur verið virkin í ymsum virksemi, m. a. ítrótti og er hann formaður í Handbóltssambandinum.

### Leivur Hansen aftur í SvF



Fyrrverandi borgarstjórin í Havn, Leivur Hansen, hevði sín fyrsta arbeiðsdag í Sjónvarpi Føroya hósdagin.

Men hann er ikki í starvi á tíðindadeildini. Síðani Leivur Hansen fór í farloyvi 1. januar 1997 er bygnaðurin í sjónvarpinum broyttur.

Nú Leivur Hansen byrjar aftur, verður tað sum programmedarbeiðari á mentanardeildini, har Ivan Niclasen er leiðari.

So er spurningurin, hvussu Leivur Hansen hevur tað við at flyta frá palesanderborðinum á Vaglinum til »klivan hjá Ivan«, sum onkur av starvsfeløgunum skemtandi tók til...

Leivur Hansen er útbúgvin journalistur frá journalistskúlanum í Århus. Hann hevur drúgvar royndir í føroysku miðlunum. Eitt skifti var hann blaðmaður á 14. September, og tá Ólavur Michelsen, blaðstjóri, doyði í 1978, gjørdist Leivur Hansen blaðstjóri á 14.

Seinni fór Leivur Hansen í útvarpið at starvast til hann fór í starv í Sjónvarpi Føroya.

Leivur Hansen varð valdur í Tórshavnar býráð í 1988 umboðandi Tjóðveldisflokkin


## Tøkk

Øllum tykkum, ið mintust meg á 90 ára føðingardegnum 18. januar, takki eg hjartaliga.

**John Thomsen**
Klaksvík



Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Nú byrjar nýggjur túrur

**Málið er at fáa fleiri ferðafólk til Norðoyggjar og at fáa tey at steðga, sigur formaðurin í nevndini fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum**

FERÐAVINNA
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** – Nú byrjar ein nýggjur túrur við nýggjum og royndum fólkum.

Hetta segði formaðurin í nevndini fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum, Finn Johannessen, á móttøku fyri nýggja leiðaranum í Norðoya Kunningarstovu.

Christian Olsen tók við nýggja fulltíðarstarvinum á Kunningarstovuni hósdagin, og tá var móttøka í býráðshúsunum í Klaksvík, har Kunningarstovan heldur til.

– Kvotan er eins stór, tólini eru nútímansgjørd, og vit skulu eisini royna nýggjar leiðir, segði Finn Johannessen.



*Formaðurin í nevndini fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum, Finn Johannessen, ynskir nýggja leiðaranum á Norðoya Kunningarstovu, Christian Olsen, góða eydnu í nýggja starvinum*

## Samstarv

Fleiri enn 150 fólk vóru til almennu móttøkuna í Norðoya Kunningarstovu, og tað helt nýggi leiðarin var ein góð byrjan.

– Skulu vit røkka úrslitum er altavgerandi, at vit eru góð til at samstarva, segði Christian Olsen á móttøkuni.

Borgarstjórin í Klaksvík helt eisini stutta røðu, og ferðavinnuumboð úr høvuðsstaðnum bóru eisini heilsan til nýggja leiðaran.

# Svínoyingar keypt brandbil

**Svínoyar kommuna hevur keypt brandbil frá Vestmanna kommunu**

BABU
*Eyðun Klakstein*

**Svínoy:** Nú fara svínoyingar at fáa brandbil í oynna.

Talan er um ein brandbil úr Vestmanna, sum Svínoyar kommuna hevur keypt sera lagaliga frá Vestmanna kommunu.

Ætlanin er at byggja eitt bilhús í Svínoy, so brandbilurin kann standa væl.

Umframt eldsløkking, sum tað vónandi ikki verður nakað av, kann brandbilurin eisini brúkast til onnur endamál í oynni.



*Bygdaráðsformaðurin í Svínoy, Pól Sundskarð, vónar samstarv við klaksvíkingar, nú svínoyingar fáa brandbil*

## Samstarv við Klaksvík

Í brandbilinum er tangi upp á 500 litrar og pumpiútgerð hoyrir eisini til.

– Vit hava tosað við Klaksvíkar sløkkilið um samstarv, og teir eru sinnaðir at veita okkum eina hjálpandi hond, sigur Pól Sundskarð, bygdaráðsformaðurin í Svínoyar kommunu.

Samstarvið við sløkkiliðið í Klaksvík skal millum annað føra við sær, at nakrir svínoyingar fáa kunnleika til eldsløkking og útgerðina, sum kemur í oynna.


Í sambandi við umbyggingararbeiðið hjá Tryggingarfeglagnum Føroyar á Kongabrúnni, verða hesar broytingar í ferðsluni gjørdar frá mánadegnum 05.03.2001.

- Kopargøta verður stongd fyri allari ferðslu
- Einvegis ferðsla verður frá Vaglinum oman eftir Áarvegnum til Kongabrúnna.
- Eingin gjøgnumkoyring verður oman eftir Erling Jallsgøtu.



**Lýst verður aftur tá koyrandi verður aftur á Kopargøtu.**

**Tórshavnar Kommuna**